VR Bilar:

# Askham Bussar nýggjan Volvo

**Mánadagin 24. oktober læt VR Bilar í Havn ein nýggjan 50-persóna Volvo-buss til Askham Bussar í Klaksvík, sum røkja rutur hjá Bygdaleiðum í Norðoyggjum. Bussurin er tann fyrsti við framkomna I-shift girkassanum**

BUSSAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Volvo bussurin hjá Askham Bussum í Klaksvík er ein 50-persóna Carrus 8700, sum er uppbygdur í Finnlandi. Motorurin er ein 6 syl. við 420 hk. (Sami motorur fæst nú eisini við 460 hk)

Nógv verður gjørt burtur trygdini í nýggju bussunum. Hesin hevur t.d. skivubremsur framman og aftan, bakkikamera, ESP stabilitetsprogramm, og trygdarbeltir við øll setrini, har nøkur eru 3-punkts. Bussurin hevur eisini DVD-anlegg og tveir sjónvarpskíggjar.

Hetta er fyrsti bussur sum er komin við framkomna I-shift girkassanum, sum er ein fullautomatiskur mekaniskur girkassi. Fyrimunurin við hesum girkassanum er, at hann skiftir bleytt og kann stillast til at vera sera økonomiskur. I-shift girkassin er annars í fleiri lastbilum og tangabilum í Føroyum.

Askham Bussar røkja rutur hjá Bygdaleiðum í Norðoyggjum.



*Bussurin er tann fyrsti við framkomna I-shift girkassanum*




*Marni Olsen (h.m.), stjóri hjá VR Bilum, handar Hans Jon Askham frá Askham Bussum nýggja Volvo-bussin*



*Trygdarbeltir eru við øll setrini, har nøkur eru 3-punkts*

# Seat Leon ársins bilur 2006

**26 limir í "Motorjournalisternes Klub Danmark" hava kosið nýggja Seat Leon til ársins bil í Danmark 2006. Nýggi Seat Leon kemur á marknaðin fyrst í komandi ári**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Nýggi Seat Leon er kosin ársins bilur í Danmark 2006. Bilurin kemur á marknaðin fyrst í komandi ári*

Í tíðindaskrivi verður sagt, at Seat Leon er ein designperla, sum sameinir sportligar koyrieginleikar við ein rúmligan familjubil, samstundis sum bilurin uppfyllir hægstu krøv til trygd. Heiðurin er samstundis eitt herðaklapp til heimskenda bildesignaran Walter de Silva, sum kom frá Alfa Romeo til VW-konsernina fyri nøkrum árum síðan.

Í mun til forgangaran er nýggi Leon væl størri og rúmligari. Eins og á t.d. Alfa Romeo 156 sita hurðahandtakini til bakhurðarnar fjald í aftastu síðurútunum.

Fimm motorar eru at velja ímillum, tveir bensin og tveir diesel. Bensinmotorarnir eru: 1,6 litur við 102 hk, og 2,0 litur FSI við 150 hk og ein FSI við 185 hk. Dieselmotorarnir eru: 1,9 litur TDI við 105 hk, og 2,0 litur við 140 hk.

Leon hevur ESP sum standard eins og differentialesperru og bremsuassistent. BSW-skipanin heldur bremsuskivurnar reinar og fríar fyri vatn, og TSC-antispinn er ein partur av ABS-bremsuskipanini.

Nýggi Seat Leon kemur á marknaðin fyrst í 2006.



*Formaðurin fyri "Motorjournalisternes Klub Danmark", Finn Knudstrup (h.m.) ynskir tíðindastjóranum hjá Seat í Danmark, Henrik Hagen, tillukku við ársins bili 2006*